

*Nú er fiskurin komin uppá land. Jakku saman við abbasoninum Jákup, sum saman við mammuni býr í USA*



*Gimme saman við einum abbasoni*

at halda, og eg fór at møðast, men eg bleiv við. So einaferð skrædnaði úr honum og leyst var. Tað er annars soleiðis við kalva, at verður drigið javnt, so fylgir hann við upp gjøgnum sjógvin uttan mótstøðu. Men verður steðgað á, kann hann varnast, at okkurt er galið, og tá kann hann gera bart. Tá er ikki nógv at gera.

Eg skal leggja afturat, at Eigil Hansen hjá Poul á Borð eisini var við mær, eftir at hann legðist uppá land av langfarasigling. Hann var tá framvegis raskur og var við mær í fleiri ár. Hann var við nærum hvønn túr. Tað einasta, sum kundi fáa hann at geva avboð var, um tað var onkur týdningarmikil dystur hjá HB, sum hann ikki kundi forsøma! Hann var óføra raskur og fittur at vera saman við.

Eg kann skoyta uppí, at vit fiskaðu eisini kalva til royndarstøðina. Vit løgdu presending í skutin og fyltu hann við sjógv, og kalvin varð so koyrdur í. Hetta riggaði heilt væl.

## Gavst at rógva út

Eina ferð mátti eg koma til tað, at nú var tíðin komin at gevast við vinnuligum útróðri. Eg róði við 10-mannafarinum, til eg ikki orkaði meira. Tað var ein deiligur bátur, men hann havi eg ikki longur. Men eg havi tó ikki heilt slept sjónum. Nú fari eg á flot onkran góðan dag, tá ið eg orki saman við onkrum, sum til dømis Dánjal Norðberg, Hákun systkinabarnið, Johan McDonald, Johan Restorff og Gustav systursoninum og øðrum.

## Hummaraveiða

Á eldri árum fór eg at fiska hummara við rúsum. Eg var saman við Finn Lómstein, sum átti loyvið. Finnur var fyrisitingarleiðari í sjónvarpinum, men honum dámdi sera væl at fara í bát. Vit fiskaðu í Sundalagnum, og tað gekk saman umtikið væl. Hetta var ein fittlig veiða.

Onkuntíð hevur verið hugsað um, hvørt hummari er at fáa til havs. Men tað havi eg ikki varnast, og fiskiroyndir hava heldur ikki víst tað.

Finnur var ein sera dámligur maður. Men hann gjørdist sera sjúkur, hann doyði bert 60 ára gamal í 2003.

## Gimme – sjógvurin var hansara lív

Eg fari at siga eitt sindur um beiggja mín Arngrim, vanliga kallaður Gimme, sum var eitt ár eldri enn eg. Hann varð eisini kendur sum útróðrarmaður. Gimme var við Norðbúgvanum áðrenn eg fór við, og var hann eisini við á sildaveiðu í Norðsjónum við honum. Eg minnist, at fyrsta árið við Norðbúgvanum forvann hann 2.000 kr, hetta var nógv tá.

Gimme var eitt skifti við Vesturvarða hjá Dia á Vertshúsinum. Men so fekk hann tuberklar í 1942 og varð innlagdur á Sanatoriið. Her lá hann í eitt ár. Tuberklarnir komu í ryggin, hann mátti á einum sinni liggja 10 mánaðir út í eitt á einum bretti. Hetta hevur verið hart. Hann fór síðan á háskúla fyri at koma fyri seg aftur, aftaná fór hann skiparaskúla, har vit gingu saman. Síðan fór hann umborð aftur á Vesturvarða í 1945.

Seinni fór hann við snurriváðbáti hjá Dánjal Niclassen sum roydni í Norðsjónum. Hetta var við Vesturleið, sum seinni gjørdist ferðamannaskip millum Havn og Vágar, og sum mong minnast ilt á vegna rull og sjóverk. Her gjørdist hann eisini skipari. Í 1948 tók hann longdina. Hann var aftur við trolarum sum skipari, men tá brutu tuberklarnir út aftur.

Tá gavst hann at sigla og fór at rógva út. Hetta hevði tann fyrimun, at hann kundi arbeiða, sum hann orkaði. Hann var eisini kalvamaður, man annars plagdi hann at dyrgja eftir seiði, sum hann so seldi í Vágsbotni.

Í eini 40 ár fiskaði hann mest seið. Zakarias Hammer hevði einaferð eina sending í sjónvarpinum við honum, har Gimme greiddi frá seiðafiskiskapi við runddorg.

Tað ráddi um at fara út, áðrenn tað fór at lýsa á morgni, tí tá tók seiðurim best. Tað sama var við skýmingini. Besta veður var ikki tað besta til seið. Seiðurin tók best, tá ið tað var eitt sindur sjaskut. Men var ov nógv regn, var hetta heldur ikki gott. Tað kundi vera rokveiða viðhvørt. Einaferð fekk hann 2.500 pund eitt kvøld. Annars var ein hampilig veiða eini 4-600 pund.

Tað var ymiskt, sum tað royndist við seiði. Tá ið tað var slakk við seiði, varð fiskað eftir kalva um summarið.

Seiðurin var vanliga seldur í Vágsbotni, har Gimme hevði sínar føstu kundar. Seiður var bíligur og góður døgurðamatur. Einir 10 seiðir kundu fáast fyri 20 krónur. So vóru tað eisini tey, sum keyptu í stórum til at gera knettur og frikadellur og eisini at hanga upp at turka.

Gimme var eisini onkuntíð við Silver Spray hjá Herman í Hósvík at skjóta sildrekar.

Aðrar tíðir var hann á Norðhavinum. Og tá var fiskur við lít. Hann nevndi onkran dagin, hann saman við tveimum dreingjum kundi fáa 5-6.000 pund.

Men longu, tá ið henda samrøðan var gjørd við Gimma í 90-unum, stúrdi hann fyri toskinum. Hann var sannførdur um, at garnaveiðan seinast í 60-unum hevði beint fyri honum, og tað sum gørnini ikki høvdu gjørt, høvdu trolararnir klárað.

Eg eri púra samdur við honum.

Gimmi doyði í 2001, men hann segði í umrøddu sending, at báturin var lívið hjá honum, hann kundi ikki hugsað sær at skula arbeitt á landi, og tað gjørdi hann heldur ikki.

Tað kann sigast um okkum báðar, at vit stórt onga krónu hava forvunnið við arbeiði á landi.

## Jens Reinert var framburðsmaður

Eg fari at greiða eitt sindur frá nøkrum av systkjunum hjá pápa mínum. Jens hevur longu verið umrøddur í samband við kafeina, pápi og hann høvdu saman. Hann flutti til Canada í nøkur ár, har hann arbeiddi í eini skóg. Hann fortaldi einaferð um eina næska bjørn, sum vildi eta matin hjá honum. Tá fór hann at steina eftir henni. Hetta var helst býtt, tí bjarnir eru ikki at spæla við. Jens kom so heim aftur seinnapartin av 30-unum, hann giftist við Juliu úr Nólsoy. Tey fingu fimm børn, tveir dreingir og tríggjar gentur.

Hann keypti eina trøð uppi undir Fjalli. Hann fekk sær ein handil, sum seinni var kendur sum Kjøtbúðin. Men upprunaliga var alt møguligt at selja, sum til dømis frukt.

Eg plagdi viðhvørt at hjálpa Jens við at skrælla fugl og annað slíkt. Her kom nógv fólk inni, tað var ikki bert fyri at keypa. Her komu nógvir kendir havnarmenn kanska mest fyri at práta. Ein teirra var Tom Nicolajsen, sum var kendur fyri at vera sera stuttligur og at duga at taka til. Eina ferð kemur kona Anthion Degn inn og skal keypa eina peru. Nei, sigur Jens, tað lá ikki so væl fyri. Hann átti bert eina peru, men hon var so bleyt, »og full

→